# Strandferðslan komin heim



*Nýggja høvuðssætið hjá Stranfaraskipum Landsins, sum nú liggur nú á Tvøroyri, eins og strandferðslan gjørdi tey allar fyrstu árini fyri meirin enn hundrað árum síðani*

**Tað byrjaði á Tvøroyri fyri meiri enn einari øld síðani, og nú er Strandferðslan aftur á Tvøroyri. Nógv vitjaðu inn á gólvið fríggjadagin, tá tað var móttøka í stásiligu skrivstovuhølunum**

STRANDFERÐSLAN
*Orð og myndir: Dagfinn Olsen*
*dagfinn@sosialurin.fo*

Fríggjadagin hevði Strandferðslan móttøku í nýggju og snotuligu hølunum á Tvøroyri. Vagn Mortensen hevði smiðju í húsunum á sinni. Í dag eigur Viberg Sørensen húsini, og húsini eru ikki at kenna aftur, og standa í allar mátar mát við nútímans stovnsbygningar.

Sera nógv fólk leitaði sær innar fyrrapartin fríggjadagin, tá almenna móttøkan var, og seinnapartin var móttøka fyri innbodnum, og har vantaði luttøkan heldur ikki.

Hóast samgongusamráðingar, so taldust løgmaður, og aðrir politikarar, millum tey vitjandi.

Virkandi strandferðslustjórin, Jákup Danielsen, helt røðu, eins og Heðin Zachariassen, (nú fyrrverandi) landsstýrismaður, og Kristin Michelsen, borgarstjóri á Tvøroyri.

## Komin heim aftur

Jákup Danielsen beyð gestunum vælkomnum og fegnaðist um stásiligu hølini og um góðu móttøkuna, sum stovnurin hevur fingið í Suðuroynni.

Heðin Zachariassen hugleiddi um samferðslukervið fyrr og nú, bæði í Suðuroynni øllum Føroyum sum heild, og ásannaði, at ábøtur, ið gjørdar eru, hava verið neyðugar. Hørðu og bleytu virðini nevndi hann eisini. Hann fegnaðist um, at nú bundið er saman, og koyrandi er um meginpartin av landinum, so ber eisini til at koyra í bili umborð á Smyril og leggja trygt at á Tvøroyri.

Kristin Michelsen byrjaði røðu sína við at siga, at øll avvarðandi áttu at taka í egnan barm, tí umstøðurnar hjá fólki við skerdum førleika eru ikki nóg góðar á nýggja stovninum. Hann fegnaðist um, at Strandferðslan "er komin heimaftur", tí tað var á hesum stað, at menn tóku upp sigling millum oyggjarnar fyri meira enn hundrað árum síðani, segði borgarstjórin á Tvøroyri. Hann handaði síðani stovninum gávu.

Limir úr Tórshavnar Stórbandi settu, saman við sangsolistunum Kristel Lisberg og Katrinu Petersen, dám á við tónleiki.



*Borgarstjórin í Hvalba, Levi Niclasen, var sjálvandi millum gestirnar*



*Jacob Vestergaard, fyrrverandi landsstýrismaður, ið var oddamaður fyri at fáa Strandferðsluna til Suðuroyra, heilsar upp á virkandi stjóran, Jákup Danielsen*



*Hendrik Old, fyrrverandi løgtingsmaður, var eisini møttur til móttøkuna*



*Tónleikaframførsla undir móttøkuni*

# ka fyri nýggja landsgrannskoðaranum



*Beinta og maðurin Hans Christian Dam. Ímillum tey sæst dótturin Ásla*

Beinta Dam er 47 ára gomul og úr Runavík. Hon er cand. merc. aud., ella kanditatur í grannskoðan, sum tað oftast verður kallað nú á døgum. Hon hevur arbeitt hjá landsgrannskoðaranum seinastu 11 árini.



*F.v.: Ása Justinussen frá landsgrannskoðaranum, og Petur Alberg Lamhauge, aðalstjóri í Fíggjarmálaráðnum, sum heilsar upp á nýggja landsgrannskoðaran*



*F.v.: Olav Enomoto, fyrrverandi løgtingsmaður, Edmund Joensen, løgtingsformaður, og Beinta Dam*